# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# OKKARA SKYLDA AT BOÐA FRÁ

Tað var hugvekjandi at hoyra eina mammu í Klaksvík stíga fram í Kringvarpi Føroya og greiða frá sínum børnum, sum eru komin út í rúsevnistrupulleikar.

At tað er ein stórur trupulleiki við rúsevnum millum ung er eingin ivi. Tað gongur sjón fyri søgn í heilum, at alt og nógv alt ov ung fólk hava slíkar trupulleikar, og tað frættist so ofta í miðlum um rúsevnissmuglarar, at tað rínir ikki við longur.

Men hví koma vit ikki einum slíkum trupulleika til lívs? Vit eru eitt lítið samfelag, har øll kenna øll so at siga, og vit eru tað danska politiøkið, sum hevur størsta uppkláringarprosentið, so tað skuldi verið lítið av miklum hjá løgreglu og tollarum at funnið fram til hvønn einasta pusjara í landinum.

Víst eru tað tey, sum smugla rúsevni til egna nýtslu so ella so, men tá tað er so lætt at fáa fatur á rúsevnum, sum tað eftir øllum at døma er, so má tað bera til at avdúka tey ússaligu skvattini, sum gera sær dælt av slíkum. Løgreglan hevur avdúkað onkrar slíkar klikur, og dómar hava verið harðir. Um teir eru nóg harðir, skal ikki verða mett um her. Men tá ein íslendingur varð dømur sjey ára fongsul her, fingu føroyingar ikki pen orð úr íslandi, sum vit fóru við slíkum fólkum, sum »bara« høvdu roynt at smugla fyri milliónir í hørðum rúsevnum at selja í Íslandi.

Men okkurt brek er í skipanini hjá okkum. Umframt tey ússaligu skvattini, sum gera sær dælt av hesum, so eru tað so nógv onnur, sum ikki vilja hesum trupulleikanum til lívs. Og millum hesi fólk mugu teljast fólk úr øllum liðum í samfelagnum - alt frá løgreglu, tollarum, lærarum, fjølmiðlafólkum og so framvegis. Tí um vit øll vildu hesum trupulleika til lívs, so var tað ikki so lætt at vera pusjari í Føroyum, og so var tað ikki so lætt at seta rúsevni í umfar.

Tað er sjálvandi gott við upplýsing, tí upplýsing og aftur upplýsing er so mangan vegurin fram. Men tað er ikki bara tað, her mugu vit standa saman, allir liðir í samfelagnum, og avdúka teir medborgarar okkara, sum ríða so niðarliga at gera sær dælt av ungum



fólkum, sum eru komin í ófóri, og sum eisini vilja tjena sær pengar upp á at koma ungum fólkum í ófóri.

Aðrastaðni eru skipað brotsmannalið, sum standa fyri slíkum. Hjá okkum er heldur talan um nøkur útskot, sum bara skulu takast við harðari hond. Vit hava øll okkara fráboðanarskyldu. Í slíkum málum er tað okkara skylda at boða frá - og gera vit øll tað, so avmarka vit í øllum førum trupulleikan.

Men tað krevur eisini, at politiska skipanin spælir við. Einaferð royndi Rás2 at lýsa trupulleikan við hassji. Tá var endin, at Bill Justinussen meldaði Rás2 fyri at reklamera fyri hassji heldur enn at gera nakað annað við trupulleikan, enn at skerja játtanina til fyribyrging.

## Eiga í felag at koma rúsevnistrupulleikanum til lívs

# Javnaðarflokkurin skyldar okkum eina umbering

Sjey frustrerað javnaðarfólk sendu fríggjamorgunin klokkan 11:40 út eina eftirlýsing eftir Gerhardi Lognberg, løgtingsmanni.

Maka til tápiligheit skulu vit leita leingi eftir. Hevði tað verið tað, at ein av javnaðarpolitikarunum í eini heitari løtu lat ein slíkan teldupost gleppa úr telduni, so var tað tað. Men at ein heilur flokkur – uttan Helenu Dam á Neystabø, sum alment hevur tikið frástøðu frá eftirlýsingini – skal loypa fram av í senn, tað boðar ikki frá góðum.

Hvussu skulu hesi fólkini klára at stýra landinum, um tey ikki klára at stýra sær sjálvum?

Og jú, Gerhard Lognberg er ikki smettin frægari. Hansara máti at uppføra seg uppá er eisini tápiligur. Sera tápiligur.

Men tann stóri trupulleikin er bara tann, at Javnaðarflokkurin hevur mist sítt trúvirði. Flokkurin er longu í sori í veljarakanningum, og tá øll tey valdu fólkini í flokkinum bera seg soleiðis at, hvør skal so tora at velja flokkin?

*Vit halda: At ting- og landsstýrisfólkini hjá Javnaðarflokkinum eiga at seta seg saman, hyggja hvør annan í eyguni og loysa trupulleikan. Tað er ikki nóg mikið, at Jóannes Eidesgaard sendir eina fráboðan um, at tey lupu framav í frustratión. Tað vistu vit, áðrenn hann sjálvur fann út av tí.*

*Javnaðarflokkurin skyldar okkum veljarum eina almenna umbering. Um nakað álit skal endurskapast, so mugu bæði Gerhard Lognberg og øll hini stíga alment fram við eini umbering. Eru tey ikki fólk fyri tí, so eiga tey øll sum ein at leggja frá sær.*





## Nú skal Klaksvík útbyggjast

ELSEBETH M. GUNNLEYGSDÓTTIR
KJAK Á SÍÐU 14



## Hvat var alternativið

JØRN ASTRUP HANSEN
KJAK Á SÍÐU 24

# Fólkaflokkurin fyri tí almenna

- Almennu stovnarnir eru fyri fólkið, ikki umvent. Soleiðis sigur býráðslimur hjá Fólkaflokkinum í Klaksvík. Sambært henni merkir hetta, at Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður skyldar klaksvíkingum okkurt afturfyri, tí hann hevur tikið føðideildina frá Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Til dømis skulu tey fáa eina urologideild í Klaksvík afturfyri. Urologi er eitt serlæknaøki, sum snýr seg um sjúkur í nýrum, urinleiðum og kynsgøgnum hjá monnum. Og hon hevur púra rætt, at almennir stovnar eru fyri fólkið. Tað átti hon og hini í Fólkaflokkinum at lagt sær í geyma. Nú hevur Fólkaflokkurin stýrt Føroyum 80 prosent av tíðini seinastu fjórðingsøldina. Tryggari enn nakar annar flokkurin hevur hann sitið við valdinum. Men ongantíð fyrr hava vit fingið eina so bólgnaða almenna umsiting, sum vit als ikki hava ráð at gjalda. Samstundis sum Fólkaflokkurin hevur lækkað blokkstuðulin og ikki megnað at skaffað tilsvarandi inntøkur.

*Vit spyrja: Er Fólkaflokkurin nú eksponenturin fyri almennari ovurnýtslu? Fyrr plagdi man at skuldseta flokkarnar á vinstraveinginum fyri at hata privat fyritakssemi og nøra um almenna ovurnýtslu, men nú tykjast almentløntu fólkaflokspolitikararnir, sum eru so væl dubbaðir við almennum pensjónum, at hava tikið á seg hendan leiklutin...*



Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*